# Chelsea Flower Show

Tað er í veruleikanum hollendarar, sum eru kendir fyri sínar tulipanir, men skal tú síggja veruliga vakrar blómur, so skal tú fara til Chelsea Flower Show. Tað ber stutt sagt ikki til at ímynda sær vakurleikan, um tú ikki hevur sæð hann. Nógv verður gjørt burtur úr við nýggjum blómum, sum blómufrøðingarnir elva fram, og tað gerst trendurin fyri blómur tað árið. Á Chelsea Flower Show sær tú allar hesar blómur, sum eru ótrúliga vakrar sum myndin eisini vísir. Einki annað stað í heiminum gjalda ferðafólk so nógv fyri at síggja ein so vakran blómugarð. So um tær dámar blómur, og um tú tilvildarliga ert í London, so vitja Chelsea Flower Show.
Sjálvt showið var frá 20. til 25. mai, men blómurnar verða verandi og til ber at síggja tær alt summarið.






















